**Gerðabók hjá Vestmanna Bygdarráð**
**Bygdarráðsfundur tann 25. septembur 2024, kl. 17.00**

**Bygdarráðslimir á fundi:** Bjørg á Rógvi, Sára Jógvansdóttir, Eyðun Hansen, Laila Haldansen, Anja Haldansen, Ingi Olsen og John Zachariassen
**Skrivari:** Rúna Ingunardóttir

---

Vísandi til grein 18, stk. 2, í løgtingslóg nr. 87 frá 17. mai 2000 um kommunustýri boðaði Pauli T. Petersen frá, at honum barst frá at møta á fundinum. 1. tiltakslimur John Zachariassen fekk fundarboð og játtaði at møta.

Áðrenn fundin greiddi Bjørg á Rógvi, borgarstjóri, frá, at síðani skráin varð løgd, er eitt mál innkomið: brunatrygd. Borgarstjórin heitti á bygdarráðið um at loyva, at málið verður sett á skrá. Eitt samt bygdarráð gekk áheitanini á møti. Málið varð sett á skrá sum mál nr. 305.

Til viðgerðar fyri **opnari hurð**:

**Mál 304**
Fíggjarætlan 2025 fyri Vestmanna kommunu
J.nr. 30102-1-2024

Fíggjarnevndin viðgjørdi á fundi tann 18. septembur 2024 fíggjarætlan fyri Vestmanna kommunu fyri 2025.

Sambært stýrisskipan fyri Vestmanna Bygdarráð §13 skal uppskot til fíggjarætlan leggjast fyri bygdarráðið áðrenn 1. oktobur.

Fíggjarnevndin samtykti einmælt at leggja fíggjarætlan fyri 2025 fram.

**Viðv. 304**
Uppskotið til fíggjarætlan fyri Vestmanna kommunu fyri 2025 varð lagt fram.

**Mál 305**
Eykajáttan til brunatrygd
J.nr.: 30102-1-2023

Vestmanna Bygdarráð viðgjørdi á fundi 4. juli 2024 mál um brunatrygd. Bygdarráðið samtykti einmælt eykajáttan til brunatrygd til Vestmanna skúla og høll á kr. 149.216 við 2. viðgerð

Leiðandi húsavørðurin mælir til, at Vestmanna kommuna eisini dagførir alarmskipanina á Dagstovnaøkinum (Gjáarlon og Látipípuni).

Samlaði meirkostnaðurin er kr. 150.000 til brunatrygd.

**Viðv. 305**
Bygdarráðið samtykti einmælt eykajáttanina á kr. 150.000 til brunatrygd, við fyrstu viðgerð.

Bókin lisin. Fundurin lokin kl 18:40

Sign.:

Bjørg á Rógvi Sára Jógvansdóttir Eyðun Hansen Laila Haldansen

Anja Haldansen Ingi Olsen John Zachariassen